# Leiðsla, ábyrgd og samstarv

## TRYGD leitar eftir bólkaleiðara til Privatsøludeildina.

**STARVIÐ**
Talan er um spennandi starv, har høvuðsuppgáva tín verður at virka sum bólkaleiðari hjá fýra starvsfólkum í sølutoyminum. Á søludeildini fært tú samstundis ábyrgdina av fleiri sølu- og fyrisitingarligum uppgávum og fert at gera títt til, at samstarvið millum deildirnar virkar væl, eins og tú fert at leiða og menna títt egna toymi.

**TÚ**
Tú hevur nøktandi útbúgving til starvið, hevur minst tvey ára leiðsluroyndir og kanst vísa á úrslit. Tær dámar væl at arbeiða í toymi, og tú hevur góð leiðsluevni. Tú tekur eisini ábyrgd, hevur yvirlit og megnar at hava fleiri bóltar í luftini í senn. Og so hevur tú sjálvandi ein fínan sans fyri handilslívi.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Finansforbundet. Tú fært eina góða, fasta løn og møguleika fyri bonus, um úrslitini eru nøktandi. Vit vilja seta starvið sum skjótast, men eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum. Skrivlig umsókn við curriculum vitae og viðkomandi skjølum skal vera okkum í hendi innan 8. juni 2007. Send umsóknina til P/F TRYGD, att.: Heidi Christensen, Gongin 7, Postboks 44, 110 Tórshavn, ella til hpc@trygd.fo.

**SOLEIÐIS ER TRYGD**
TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greidleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 35 fólk, og vit umseta fyri meira enn 75 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

**LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO**
**UMSÓKNARFREIST ER 8. JUNI 2007**

**TRYGD**
leitar eftir tær.

REPROZ

# Elektrikkari

**Vegna vaksandi virksemi, sóknast vit eftir sveini.**

**Vit vænta at tú:**
- ert arbeiðssamur
- hevur royndir innan økið
- ert álítandi
- ert fyrikomandi
- ert samarbeiðsvilligur
- ert førur fyri at taka avgerðir

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- eitt gott arbeiðsumhvørvi í eini fyritøku í menning.

Hevur hetta tín áhuga, kanst tú ringja til Oddur á telefon 505882.

KEV
**Kongshavnar El-Virkið**
Gulasteinsvegur 30 · FO-610 Saltangará
t-postur: kev@kev.fo

# Lærlingur

KEV leitar eftir góðum lærlingum innan el.

Ert tú opin og erligur, hevur rímiligan kunnleika til teldu og hug at arbeiða innan el, ynskja vit at frætta frá tær.

Fyrimunur er, um tú hevur SIT.

Send okkum eina skrivliga umsókn við avriti av prógvum v.m.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. juni.

Hevur tú okkurt at spyrja um, kanst tú ringja til Oddur á telefon 505882.

KEV
**Kongshavnar El-Virkið**
Gulasteinsvegur 30 · FO-610 Saltangará
t-postur: kev@kev.fo




## Tríggir pedagogar og ein stuðul til barnaansingina í Vágs kommunu

**Av fullum huga?**

Vágs kommuna søkir eftir trimum pedagogum og einum stuðli at byrja í starvi 13. august 2007.

**Størvini eru:**
Ein pedagogur 30 tímar til Frítíðarskúlan.
Ein pedagogur 35 tímar til barnagarðin Eikilund.
Ein pedagogur 30 tímar til barnagarðin Eikilund.
Ein stuðul 35 tímar til barnagarðin Eikilund.

**Eginleikar**
Tú dugir at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum. Tær dámar væl at vera úti, ert kreativ/ur, og megnar at hava gott samskifti og samstarv bæði við foreldur og starvsfólk.

**Lønarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Vágs kommunu, Petry Joensen á tel. 37 30 24 ella tel. 22 87 18.

**Ert tú áhugað/ur?**
Send eina skrivliga umsókn saman við prógvum, CV og møguligum viðmælum til:
**Vágs kommunu**
**Vágsvegur 22**
**FO-900 Vágur**

Umsókn saman skjølum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 4. juni 2007, kl. 12.00. Merk umsóknina "pedagogur/stuðul"

Um eingin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett ístaðin.

**Vágs kommuna**
Vágsvegur 22 • 900 Vágur
tlf 37 30 24 • vagur@vagur.fo




Sosialurin
www.sosialurin.fo